# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Nakrir av manningini á Sílinum



Her er ein av myndunum frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Á myndini eru nakrar av manningini á kappróðrarbátinum Silinum á ólavsøku 1967.

F.v.: Leivur Hansen, Høgni W. Larsen, Lutherus Hansen, Øssur Simonsen, Karl Johannes í Stórustovu, Bergur Wardum og Knút Gray.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.

*Mynd: Jan Müller (Mynd nr. 501)*

**Dagurin**
**13. juni. Kyrillos.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, helst er her talan um ein biskup í Aleksandriu, sum doyði í 444 . Erlendur biskupur doyði hendan dagin í 1308.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jana Jensen**, ættað av Hellunum, andaðist á Lágargarði í Havn mánadagin 9. juni, 96 ára gomul. Bønarhald verður á Lágargarði hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Janu kunnu lata Lágargarði eina gávu konta í peningastovni.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk veita vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá

**Jóhanna Mathea Skaale**

doyði og varð jarðað.
Tykkum, ið hjálptu til við sjálvari jarðarferðini og ervinum, takka vit eisini hjartaliga.
Eina serstaka tøkk veita vit tykkum á Ellisheiminum fyri tíðina, mamma búði har.

**Børnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og beiggi okkara

**Páll Jacobsen**
á Nesi, Vági

doyði og varð jarðaður.
Takk fyri alla hjálp og troyst, fyri heilsanir og gávur til Vágs kirkju og til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Henrikka, Niels Petur og Jóna**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir